Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Dagfesting: 17. februar 2021
Mál nr.: 20/01999

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	Løgtingslógaruppskotið
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 41 frá 26. mars 2002 um fólkanøvn, sum broytt við løgtingslóg nr. 33 frá 30. apríl 2007, verða gjørdar hesar broytingar:
§ 1. … *Stk. 2.* Eingin skal hava fleiri enn trý fornøvn, eitt millumnavn og eitt eftirnavn, sbr. tó § 2, stk. 4. Nøvn kunnu ikki verða bundin hvørt at øðrum við bindistriku.	**1.** Í § 1, stk. 2, 1. pkt., verður ", sbr. tó § 2, stk. 4" strikað.
	2. Í § 13 verður aftan á stk. 1 sum nýtt stk. sett: "*Stk. 2.* Vilja hjúnafelagar hava sama millumnavn, kann annar teirra, við samtykki frá hinum, boða vígslumyndugleikanum frá, at hann tekur millumnavnið hjá hinum, tó ikki um navnið er fingið við giftu." Stk. 2 og 3 verða eftir hetta stk. 3 og 4.

§ 13. ... *Stk. 2.* Tann av hjúnafeløgunum, ið hevur fingið ættarnavn sítt við giftu, kann boða vígslumyndugleikanum frá, at hann tekur eftirnavnið aftur, sum hann bar undan vígsluni, ella tað eftirnavnið, sum hann seinast hevur borið, og sum ikki er fingið við giftu.	**3.** § 13, stk. 2, sum verður stk. 3, verður orðað soleiðis: "*Stk. 3.* Hjúnafelagi, ið hevur fingið millumnavn ella eftirnavn sítt við giftu, kann boða vígslumyndugleikanum frá, at hann tekur millumnavnið ella eftirnavnið aftur, sum hann bar undan vígsluni, ella tað millumnavnið ella eftirnavnið, sum hann seinast hevur borið, og sum ikki er fingið við giftu."
§ 21. ... *Stk. 3.* Avgerðir hjá navnanevndini eftir stk. 2 kunnu kærast til landsstýrismannin.	**4.** Í § 21, stk. 3, verður aftan á "landsstýrismannin" sett: "í seinasta lagi 4 vikur eftir, at avgerðin er fráboðað viðkomandi".